Friggjadag 14. kl. 19.55

Bodyguard

Stjørnan, Rachel Marron, fær áhaldandi hóttanarbrøv og verður at enda offur fyri morðhóttanum. Hóast hon ikki er nógv fyri tí, so fær hon lívverju, og verður tað fyrrverandi secret-service maðurin, Frank Farmer, sum skal verja hana og son hennara. Talan er um eitt vandamikið starv, sum Frank hevur átikið sær, men hevði neyvan roknað við, at tað skuldi gerast somikið persónligt.

Friggjadag 14. kl. 20.00

Tá Harry hitti Sally

Harry og Sally hitta hvønn annan í skúlaárunum, og finna tey tá útav, at tey hava eina rúgvu til felags. Tey gerast góðir vinir, men tá skúlaárini enda, fara tey hvør til sítt. Upp ígjøgnum árini renna tey støðugt á hvønn annan í teirra ævigu leitan eftir kærleikanum.

Friggjadag 14. kl. 20.25

Okkara kokkar

Í hesari sending verða gjørdir 3 ymiskir grønmetis rættir: Grønmetissufflé, innbakað grønmetisterta og grønmetisfat í ovni við „Bechamelsós" og osti, afturvið kalkunbúffum og bacon.

Friggjadag 14. kl. 23.40



Fyritøkan

Av tí at Mitch McDeere er ein av dugnaligastu sakførarunum, sum hevur fingið prógv á Harvard, verður hann undirdiktur í tilboðum frá bestu sakførarafyritøkunum í landinum. Ein lítil fyritøka í Memphis bjóðar honum spennandi avbjóðingar og góða løn. Mitch og konan flyta glað og fróð til Memphis, men dreymastarvið verður til marru, tá stjórin sigur honum, hvat starvið umfatar. Filmurin er óhóskandi fyri smábørn

Leygardag 15. kl. 14.30

Flogbóltur

Vit senda báðar finalurnar í flogbólti beinleiðis. Kvinnufinalan millum ÍF og TB verður send klokkan 14.30 og mansfinalan millum ÍF og SÍ kemur klokkan 16.30.

Leygardag 15. kl. 15.00

Holiday Airport – Orlando

John starvast fyri Travel City Airlines, og hann hevur ír at gera í starvi sínum á altjóða flogvøllinum í Orlando. Nógv verður kravt av honum, og spennandi verður at siggja, um megnar at standa ímóti trýstinum.

Leygardag 15. kl. 19.50

Grease

Heimskendi musicalurin við John Travolta og Oliviu Newton John varð framleiddur í 1978. Í summarfrítíðini verða Sandy og Danny forelskað, men tá tey skiljast vita tey lítið um, at tey aftur skulu hittast á á Randall High. Men nú allir vinirnir eru saman við Danny, er tað ikki eins lætt at sýna kenslur sínar.

Leygardag 15. kl. 20.45

Grand Prix úr Íslandi – Eivør Pálsdóttir

Sent verður beinleiðis saman við RUV í Íslandi, og Katrin Petersen er á staðnum og ger viðmerkingar undir sendingini. Vit byrja við einum innslagi beint undan sendingini.

Sunnudag 16. kl. 12.40

Diana

Søgan um eina prinsessu. Framhald av dokumentarrøðini um prinsessuna, sum vakti ans um alt stórabretland við sjarmerandi framferð síni og góðari útsjónd. Ein søga, sum fekk ein bráðan enda, tá hon í 1997 var offur fyri eini ferðsluvanlukku.

Sunnudag 16. kl. 14.10



Carl Nielsen maraton 6:6

Carl Nielsen fer undir arbeiði við 6. symfoni á stórgarðinum Damgaard. Tá er hann illa sjúkur. Í 1931 versnar hann og doyr sama heyst. 6. symfoni, Simfonia Semplice, er hansara mest sermerkta verk og vit skulu hoyra og siggja symfoniorkestrið hjá Danmarks Radio spæla og Michael Schønwandt stjórnar.

Sunnudag 16. kl. 18.20



Biker-Jens Down under

Í Mount Isa skal Jens hjálpa einum bónda at reka neyt. Hetta gongur fyri seg við tyrlu og á hestbaki. Jens hevði tað tó ikki so gott, seinast hann var í luftini, og tí ger hann av, bert at halda seg til hestarnar.

Sunnudag 16. kl. 18.50

Moskusneyt

Moskusneyt – frumtíðardýr, sum búgva á heimsins kaldastu og oydnastu plássum, vóru við hjálp frá danska djóraføðinginum Christian Vibe í sekstiárunum flutt úr Eysturgrønlandi um Keypmannahavn til til Vesturgrønlands. Sendingin snýr seg um ferðina.

Mánadag 17. kl. 20.00

Harratúrur

Tá Mitch (Billy Crystal) kemur í yvirgangsárini, fer hann við tveimum av vinum sínum, Phil (Daniel Stern) og ED (Bruno Kirby) til New Mexico á eina sonevnda yvirlivislsferð. Tað fer eisini skjótt at vísa seg, at tað er júst yvirlivan, sum ferðin snýr seg um.

Mánadag 17. kl. 20.05

Airline

Ferðafólkini eru í øðini, og summi teirra taka lógina í egnar hendur, tá tey skulu ígjøgnum passeftirlitið. Eitt av ferðafólkunum skapar ein álvarsligan trygdartrupulleika, og tveir fiskarar frá gullstrondini enda onkursvegna í Liverpool.

Mánadag 17. kl. 21.00

Kærleikans kalejdoskop

Triggjar systrar verða skildar frá aðrari, tá mamma teirra doyr. Tríati ár seinni royndir ein maður tó at fáa tær saman aftur. Søgan byggir á bestsellaran hjá Daniel Stern, sum er ein av heimsins best umtóktu rithøvundum.

Mánadag 17. kl. 21.55

Coupling

Seinasti partur, tíverri, av Coupling sum, siga tey, er eitt bersøgið bretskt svar upp á skemtirøðina "Vinir". Soleiðis siga ummælarar um vælumtóktu skemtirøðina Coupling. Coupling fekk Silvurrósuna fyri at vera besta skemtirøðin á Montreux sjónvarpsstevnuni í fjør.

Týsdag 18. kl. 20.00



Tequila Sunrise

Mac er ein narkohandlari, sum roynir at koma út úr hesum yrkinum. Tá barndómsvinur hansara, Nick Frescia, sum er løgreglumaður ein dagin fær boð um at steðga honum, er friðurin tó úti. Og trupulleikarnir gerast ikki minni, tá hin vakra Jo Ann Vallenari kemur í myndina.

Týsdag 18. kl. 21.05

Hamsun 2:2

Annar partur av stórfilminum um hjúnini Hamsun. Tey høvdu eitt trupult samlív. Marie heldur, at hon hevur offrað sítt lív fyri tann tvøra og innhaldsríka rithøvundan, sum eisini sjálvur er ein beiskur maður. Undir Seinna Heimsbardaga taka tey alment undir við Hitler, sum eftir bardagan hevur við sær, at tann annars vælumtókti Knut Hamsun verður dømdur fyri landasvik.

Týsdag 18. kl. 22.15

American History X

Derek Vinyard er oddamaður í nasifelagsskapinum í Los Angeles og yngri beiggin Danny forgudar Derek. Tá Derek fær trý ára fongsulsrevsing fyri at hava dripið tveir nekarar, er hann í eygunum á beiggjanum ein hetja. Men fonglsið broytir Derek. Tá hann sleppur út aftur og nasistarnir bjóða honum vælkomnum, sum ein lýsandi hetja, veit hann ikki, hvussu hann skal hjálpa beiggjanum og sær sjálvum burtur úr felagsskapinum. Filmurin er óhóskandi fyri børn.

Týsdag 18. kl. 22.30

Aktandi konur

Loyndarmálið handan eitt langt og lukkuligt giftarmál er, at kvinnan yvirgevur seg fullkomuliga til mannin. Tað er í øllum fórum niðurstøðan hjá amerikanska rithøvundanum, Laura Doyle.

Mikudag 19. kl. 19.00

Eg vil verða Playmate

Í USA hava hópin av ungum, vøkrum gentum ein dreym um at gerast playmate. Tað er gentan, sum prýðir forsíðuna á Playboy, og nú talan er um jólaútgávuna, er hetta teirra heilt stóri møguleiki.

Mikudag 19. kl. 19.00

Plastic Fantastic

Øll starvsfólkini á klinikkini fáa stóran avsláttur, um tey vilja hava eina viðgerð, og flestu av teimum taka eisini av hesum. Millum annað hevur danska Joan Jensen tikið nakað av búkinum burtur, og hon er væl nøgd um hetta.

Mikudag 19. kl. 19.15

Kajakkin

Robert Schmidt er veiðimaður í Íslandi og hann skjýtur fugl úr kajak. Alt lívið snýr seg um at veiða, og er hann ikki á havinum, so fer hann í hagan at veiða.

Mikudag 19. kl. 20.55

Prix Føroyar

Luttakandi bólkarnir í hesari kappingini eru Bracket, Crashwave. MARY'S BABY, Lawetz, Krit og Masha.

Hósdag 20. kl. 20.00

Hjálp vit hava fingið børn

Innan fáar vikur uppliva Lene og Robert tann heilt stóra rutsjitúrin. Gleðin um at verða vorðin foreldur verður avloyst av óttanum og trupulleikunum, tá barnið hevur fingið kolikk. Hetta ger, at tey verða noydd at leggja gerandisdagin fullkomuliga um, men sum flestu foreldur, so megna tey tó eisini hetta.

Hósdag 20. kl. 19.40

Ein serlig nátt

Saman funnu tey nakað, sum tey ikki trúðu var gjørligt – ein nýggjan kærleika. Læknin Catherina hevur mist mann sín, og hóast hon verður boðin heim til ein starvsfelaga, vil hon heldur vitja staðið, har hann var sína seinastu tíð. Robert Woodward roynir at fáa fatur á einum taxabili, eftir at hann hevur vitja sjúku konu sína, sum ikki kennir mannin aftur. Veðrið er tó av tí ringasta, og eingin bilur er at fáa. Ikki fyrr enn Catherina bjóðar honum at koyra við sær.

Hósdag 20. kl. 21.35

Kvøldvaktin

Í New York starvast brandmenn og læknar á horninum millum King Boulevard og Arthur – Camelot – ofta saman við løgregluni á støðini nærhendis. Hesi heilt serligu fólkini seta javnan egin lív í váða til tess at bjarga øðrum, og tó at talan er um hart arbeiði, eru tey fyri aftur til arbeiðis kl. 3.00 næsta morgun.

Hósdag 20. kl. 22.00



Krimitímin

Dalziel & Pascoe 1:2. Øll hildu at fyrrverandi rektarin á Holm Coltam universitetinum Alison Girling doyði í einari bussvanluku í Eysturríki fyri fimm árum síðan. Men tá universitetið tekur minningarstandmyndina av Girling niður, fyri at rudda pláss fyri einum nýggjum bygningi, vísir tað seg, at standmyndin krógvar eitt kvinnulík. Alison Girling liggur grivin undir síni egnu standmynd. Dalziel og Pascoe fáa málið at loysa.

Mikudagur 19. kl. 19.30

Fólk og frítíð

Flest allir føroyingar munnu kenna Óla Petersen, sum í mong ár var ein av høvuðsmonnunum handan Rukkulakkan, og sum seinnu árini hevur prýtt baksíðuna á Sosialinum. Í sendingini hesuferð skifta vit orð við Óla um eitt nú tekning sum ítriv og lívsstarv, áhuga, íblástur og fyrimyndir, eins og nomið verður við satiru og hvønn týdning hendan hevur. Gunnar Nolsøe leggur til rættis.

Morgunlestrar í Útvarpinum
17. - 22. februar 2003
Ebbe Rasmussen í Heysti lesur

Mánadagin 17. februar
nr. 277 Guð, eftir tær mær leingist
Málaki 4,2

Týsdagin 18. februar
nr. 48 Litla Guðs barn, hvat sakar teg
Matt. 5,3

Mikudagin 19. februar
nr. 329: Jesus góði, sman her
Sálm. 119,162
nr. 332 Titt orð er, Guð, várt arvagóðs

Hósdagin 20. februar
nr. 549 Nú vakni øll úr svøvni glað
Matt. 5,16
nr. 67 Set alla gerð í Jesu navni á

Fríggjadagin 21. februar
nr. 52 Eydnan er ein at líta á
Jes. 40,29
nr. 558 Faðir, fylg mær henda dag

Leygardagin 22. februar
nr. 330 Yndislig, føgur
Sálm. 90,1
nr. 21 Algóði faðir! tú yndismilt bendir

Ítróttur

Leygardagin kl. 14.30
Flogbóltur: Steypafinalurnar
Leygardagin kl. 18.30
FA-Cup: Mancester Utd.-Arsenal

Sunnudagin kl. 19.25
La Primera, beinleiðis
Sunnudagin kl. 21.30
Golf: PGA Buick Invitational
Mikudagin kl. 19.00
CL fótbóltur

CANAL+
Sunnudagin kl. 13.55
Seria A: Parma Juventus
Mikudagin kl. 1.30
NHL: Dallas-Calgary

CANAL+
Leygardagin kl. 19.25
Seria A: Roma-Brescia
Sunnudagin kl. 19.25
Seria A: Milan Lazio

Leygardagin kl. 13.00
Hondbóltur: Debrecen-Slagelse, kvinnur
Mánadagin kl. 10.00
V5-Travet

EUROSPORT
WC Snowboard úr Berchtesgaden, Týskland
WC Langrenn úr Asiago, Italia
WC Langrenn úr Asiago, Italia
WC Langrenn úr Reit im Winkl,, Týsklandi
WC Skíðlop úr Willingen, Týsklandi
WC Sleðu úr Winterberg, Týsklandi
WC Freestyle úr Tremblant, Canada
HM Snirr úr St. Moritz, Schweiz
HM Skíðskjóting úr Holmenkollen, Noreg
HM Bobsleðu úr Lake Placid, USA
HM Skeleton úr Nagano, Japan
HM Skoyting úr Göteborg, Svøríki
WTA Tennis úr Antwerpen, Belgia
ATP Tennis úr San Jose, USA
Frælsur ítróttur úr Leipzig, Týsklandi
Fótbóltur: Copa Libertadores
Beinleiðis nevaleikur

TV2 ZULU
Badminton: All Englad Beinleiðis
Fríggjadagin kl. 19.25
CL-hondbóltur: Hypo-Ikast/Bording, k
Leygardagin kl. 12.10
FA-Cup: Manchester Utd.-Arsenal
Leygardagin kl. 14.55
FA-Cup: Southampton-Norwich
Sunnudagin kl. 12.55
Íshockey: Odense-Rungsted
Sunnudagin kl. 13.35
FA-Cup: Crystal Palace-Leeds
Sunnudagin kl. 15.55
FA-Cup: Stoke-Chelsea
Sunnudagin kl. 18.55
FA-Cup: Wolves-Rochdale

Mikudagin kl. 19.00
CL-fótbóltur
Leygardagin kl. 19.00
Nevaleikur: Knockout Live

Leygardagin kl. 14.25
Bundesliga: Hamburger SV-Wolfsburg
Sunnudagin kl. 16.25
Bundesliga: Borussia Mönchengl.-Hertha Berlin
Sunnudagin kl. 20.30
NBA: Sacramento-San Antonio
Hósdagin kl. 19.30
UEFA-Cup: Auxerre-Liverpool

VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin